## Tann øvugta verð

Javnan hoyra vit um fólk, sum royna at flýggja úr Norðurkorea til Suðurkorea ella Kina, men eru tíðindini álítandi, so eru tað eisini tey, sum velja at fara hinvegin. Almenna norðurkoreanska tíðindastovan skrivar í dag, at ein 30 ára gamal suðurkoreanari er flyddur norður um markið, og at hann er ovurfegin um at hava framt tað stóra bragdið, sum sagt verður. Sambært suðurkoreonsku myndugleikunum er hetta fyrstu ferð í fýra ár, at nakar er farin norður um markið. Myndugleikarnir leggja afturat, at tann, sum fór norðurum fyri fýra árum síoðani, var fullur.



## Keglast um njósning

Stjórin í Venesuela leggur nú myndugleikarnar í grannalandinum Kolombia undir njósning. Viðurskiftini millum tey bæði grannalondini hava verið spent, síðani Kolombia loyvdi USA at seta upp herstøðir í landinum. Venesuela vil vera við, at herstøðirnar eru ætlaðar til álop á landið, men bæði Kolombia og USA siga, at tær skulu hjálpa kolombiska herinum í bardaganum við rúsevnaharkaliðini. Venesuelski forsetin, Hugo Chavez, segði í gjár, at kolombiska fregnartænastan fregnast í Venesuela. Kolombiski forsetin, Alvaro Uribe, vísir skuldsetingini aftur.

# Klaksvíkingar mist vónina um Norrønu

**Býráðið hevur sagt samstarvsavtaluna við Smyril Line upp og tey vænta ikki, at Norrøna verður nakað at byggja álitið á í framtíðini**

NORÐHAVNIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Klaksvíkingar hava nú mist vónina um at fáa nakað burtur úr Norrønu.

Tað staðfestir Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík.

Fyri trimum árum síðani gjørdu Klaksvíkar Býráð og Smyril Line samstarvsavtalu um, at tá ið tað ikki viðraði hjá Norrønu at leggja at í Havn, skuldi hon brúka nýggju Norðhavnina í Klaksvík.

Men tað hevur gingið meiri strilti, tí Smyril Line hevur heldur viljað lagt Norrønu í Kollafirði, tá ið ikki er farandi inn um molan í Havn.

Borgarstjórin í Klaksvík sigur, at samstarvsavtalan ímillum Klaksvíkar Býráð og Norrønu gekk til 1. oktober í ár og í summar segði býráðið avtaluna upp.

Síðani hevur býráðið samráðst við Smyril Line um eina nýggja samstarvsavtalu, men borgarstjórin dylir ikki fyri, at hon hevur smáar vónir.

- Smyril Line hevur gjørt av, at tey vilja heldur brúka Kollafjørð og tað er okkurt, sum sigur mær, at skulu vit útvega Norðhavnini inntøkur, er tað neyvan Norrønu, vit skulu seta okkara álit á, staðfestir hon.




*Norrøna hevur verið sjáldan gestur í Klaksvík, hóast avtala er um at rúka Norðhavnina og klaksvíkingar hava nú slept vónini um at fáa nakra avtalu við Smyril Line*

### Kanna aðrar møguleikar

Men tað verður kortini arbeitt víðari í roydnunum at útvega Norðhavnini inntøkur og hóast tað neyvan verður frá Smyril Line, eru vónirnar góðar um at finna aðrar inntøkukeldur.

Gunvá við Keldu sigur, at arbeitt hevur verið við at fáa útlendskt ferðamannaskip til Klaksvíkar.

- Hildið verður fram við teimum royndunum, hóast tað er sera drúgført arbeiði.

Annars verður roynt at fáa samvinnu í lag við russisk skip og eisini tað hava tey vónir um.

Men samstundis seta tey sítt álit á, at virksemið byrjar aftur á Kósini og at tað fer at føra fleiri skip til Klaksvíkar og so er tað skipið, sum kemur ístaðin fyri Næraberg.

- Nú er Norðhavnin gjørd og so er tað okkara avbjóðing at finna henni inntøkur, staðfestir Gunvá við Keldu.

# Átta almenn størv flytast til Klaksvíkar



*Aksel V. Johannesen lívgar nú heimbýnum við átta almennum størvum*

**Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur gjørt av, at stovnurin, sum skal umsita nýggju heilsutrygdina, skal leggjast í Klaksvík**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Stovnurin, sum skal umsita nýggju heilsutrygdina, sum kemur í gildi á nýggjárinum, skal leggjast í Klakasvík.

Tað hevur landsstýrismaðurin í heilsumálum, Aksel V. Johannesen, gjørt av.

Hann staðfestir, at seinastu árini eru fleiri almennir stovnar lagdir úti um landið og at túrurin nú er komin til Norðoyar.

Væntandi fara átta fólk at arbeiða á stovninum.

Gjørd í stigum

Nýggja sjúkratryggingin verður gjørd í stigum.

Í fyrsta lagi verða sjúkrakassarnir tiknir av, og øll umsitingin savnað í ein stovn, sum skal eita Heilsutrygd og tað er hesin stovnurin, sum skal leggjast í Klaksvík.

- Í dag eru 11 sjúkrakassar í Føroyum, sum hvør í sínum lagi hava eina umsiting og hvør ásetur sítt egna sjúkrakassagjald.

Aksel V. Johannesen sigur, at hetta skal nú broytast til eina samhaldsfasta skipan, har øll rinda sama gjald. Gjaldið verður 245 krónur um mánaðin og tað verður TAKS, sum krevur tað inn.

Fyri summi er hetta ein hækking og fyri onnur er hetta ein lækking. Í Fuglafirði er gjaldið 175 krónur um mánaðin, og á Sandoynni er gjaldið 310 kr.

Men hendan skipanin verður bara galdandi í tvey ár, tí í 1912 skal til sjúkratryggingin verður partur av fíggjarlógini og takast inn við skattinum.

- Ein onnur broyting er, at tilskotið til heilivág verður útroknað eftir einum nýggjum samhaldsføstum leisti. Tey, sum brúka mest pengar til heilivág, fáa eftir nýggju útrokningini mest endurgoldið frá Heilsutrygd. Higartil hava øll fingið 50 prosent endurgoldið frá fyrstu krónu.

- Eftir nýggju skipanini skulu øll gjalda tær fyrstu 500 krónurnar um árið sjálvi. Á tann hátt ber til at gera eina samhaldsfasta skipan, har tey, sum noyðast at brúka nógvan heilivág, fáa størri endurgjald enn eftir verandi skipan.

Landsstýrismaðurin sigur, at ung undir 18 ár og fólk yvir 67 ár koma í mesta lagi at gjalda 1195 krónur um árið fyri heilivág. Hini koma í mesta lagi at gjalda 1600 krónur um árið.

Ein broyting afturat er tann, at Heilsutrygd at veita tilskot til kostískoyti, merkivørur o.a., sum Almannastovan áður hevur veitt ískoyti til. Tað snýr seg m.a. um serligt ískoyti av vitaminum og mineralum, um serligt kostískoyti til diabetikarar um pínuheilivág, allergiheilivág, eygnaheilivág o.s.fr.

Ein stórur spurningur er so, hvussu verður við ognunum hjá sjúkrakassunum, sum nú eru.

Verður úrslitið, at ognirnar fella til Heilsutrygd, fer landsstýrismaðurin at tryggja, at pengarnir ikki verða brúktir til vanligan rakstur.

- Ístaðin verður umhugsað at gera ein heilsugrunn, sum skal veita stuðul til átøk, ið hava til endamáls at menna heilsuna hjá føroyingum, m.a. heilsugranskning, sigur landsstýrismaðurin.